TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Heilsuatstøðari og hjálparfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir heilsuatstøðara og hjálparfólki til Ellis- og umlættingarheimið.

## Heilsuatstøðari

**Starvið**
Fevnir um vanliga røkt og annað arbeiði við tilknýti til røkt. Starvið er ¾ starv.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. november 2001. Løn sambært galdandi sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

## Hjálparfólk

**Størvini**
Størvini fevna um tvey ¾ størv og eitt ½ starv. Arbeiðið fevnir um vanligt hjálparfólkaarbeiði og alt vanligt arbeiði á heiminum, t.d. eldrarøkt og reingerð.

**Setanarviðurskifti**
¾ størvini verða sett 1. oktober 2001 og ½ starvið verður sett 1. december 2001.
Løn sambært galdandi sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, fyristøðukvinnu, tlf. 31 73 39.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um royndir og við møguligum viðmælum skulu verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 24. september 2001.

SNARSKIVAN

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Mazda 323 2.0 D Sedan - 5 gear, 4 hurðar
**Árg.:** 1998
**KM:** 60.475

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Heri Weihe, sýnsmaður
t-post: hw@trygging.fo
tlf. 345729
fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. $08^{00}$–$10^{00}$
og fríggjadag kl. $08^{00}$–$16^{00}$

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Dagrøktarar til Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir dagrøktarum.

**Tórshavnar kommuna bjóðar**
Sum dagrøktari í Tórshavnar kommunu fært tú eitt sera sjálvstøðugt og fjølbroytt starv og hollan stuðul frá kommunalu skipanini.
Fyri at hava børn í dagrøkt er neyðugt, at hølini, har børnini verða ansað, eru egnað, og at møguleikar eru fyri uttandura virksemi.

**Setanarviðusrskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála við Starvsmannafelagið. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðsla í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Meira fæst at vita**
við at venda sær til Brynhild Mohr Joensen, leiðara, tlf. 315160.

**Umsóknir**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til: Tórshavnar kommuna, Dagrøktarskrivstovan, Kirkjuvegur 1, 100 Tórshavn.

SNARSKIVAN

Søkt verður eftir

# Maskinmeistara

til nýggja virki okkara í Klaksvík.

Skrivlig umsókn verður at senda inn áðrenn 1. oktober 2001.

**P/f Kryvjing**
Postrúm 250
700 Klaksvík

# Felag fyri minnisveik (dement) og avvarðandi teirra

Stovnandi aðalfundur verður sunnudagin 9. september 2001 kl. 15.00 á Hotel Føroyum við hesi dagsskrá:

Kl. 15.00: Aðalfundur.
Eftir aðalfundin greiðir Inger Marie Jensen, formaður fyri danska Alzheimerfelagnum, frá teirra arbeiði.

Kaffisteðgur

Birita Mohr lesur yrkingar.

Kl. 16.30: Per Kragh-Sørensen, næstformaður í danska Alzheimerfelagnum, hel dur fyrilestur um demens.

Per Kragh-Sørensen er professari í psykiatri og leiðari fyri Deplinum fyri Depressións- og Demensgransking á Universitetssjúkrahúsinum og á Universitetinum í Odense.

# Avloysari

Dagrøktarskipanin á Viðareiði søkir eftir avloysara fyri dagrøktara í barnsburðarfarloyvi at byrja skjótast gjørligt.

Umsóknir eiga at vera skipanini í hendi **seinasta lagi 15. september**.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Elin Noru Reines, dagrøktarleiðara **tlf. 451182**

Umsóknir skulu sendast til **Dagrøktarskipanina í Viðreiðis Kommunu, 650 Viðareiði**

# Hondbóltsfelagið Tjaldur

| Tíð | Mánadagur | Týsdagur | Mikudagur | Hósdagur |
|---|---|---|---|---|
| 15.00-15.45 | Dreingir 3 fl. | Gentur 3-4 fl | Dreingir 3 fl | Gentur 3-4 fl |
| 15.45-16.30 | Dreingir 4 fl | Gentur 5-6 fl | Dreingir 4 fl | Gentur 5-6 fl |
| 16.30-17.15 | Dreingir 5 fl | Dreingir 6 fl | Dreingir 5 fl | Dreingir 6 fl |
| 17.15-18.00 | Dreingir 14 og 16 | Gentur 14 og 16 | Dreingir 14 og 16 | Gentur 14 og 16 |
| 18.00-19.30 | Kvinnur 2-3 d | | Kvinnur 2-3 d | Kvinnur 2-3 d |
| 19.30-21.00 | Menn 1-3 d | | Menn 1-3 d | Menn 1-3 d |

**Venjingin byrjar mánadagin 11. september 2001**



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3222

Navn: P/F DONG Føroyar
Adressa: Hanusargøta 2, Postbox 3188, 110 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 28.06.2001
Viðtøkudato: 28.06.2001
Kapitalur: Kr. 5.000.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 5.000.000,00 til kurs 100.
Stovnari: DONG Efterforskning og Produktion A/S, Agern Allé 24-26, DK-2970 Hørsholm.
Nevnd: Hans Jørgen Kruuse Rasmusen, Krokusvej 10, DK-2970 Hørsholm (formaður), Peter Skak-Iversen, Hovmosevej 12, Gadevang, DK-3400 Hillerød (næstformaður) og Søren Gath Hansen, Avnsøvej 3, DK-2820 Gentofte.
Stjórn: Søren Gath Hansen, Avnsøvej 3, DK-2820 Gentofte.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av trimum nevndarlimum saman ella av nevndarformanninum ella næstformanninum saman við einum stjóra ella av tveimum stjórum saman.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 28.06.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at kanna og útvinna kolvetni á føroyskum øki, at goyma og handfara, flyta og selja kolvetni eins væl og onnur viðkomandi orkusløg, umframt úrdráttir og veitingar í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 6. september 2001

Kristin Balle

www.sosialurin.fo

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Peugeot 106 1.5 XND
**Árg.:** 1997
**KM:** 85.840

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Heri Weihe
tlf. 345600 – lokal 729
fax nr. 345607
at hitta millum kl. $8^{00}$-$10^{00}$

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Daewoo Nubira 2,0 st.car
**Árg.:** 2000
**KM:** 18.318

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Heri Weihe, sýnsmaður
tlf. 345729
fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. $08^{00}$–$10^{00}$
og fríggjadag kl. $08^{00}$–$16^{00}$

Røktar- og umlættingarheimið
*Lágargarður*

# Deildarleiðara-starv

## á Lágargarði er leyst at søkja

Lýst verður eftir **sjúkrasystur** í deildarleiðarastarvið á Heimarustovu fyribils í 1 ár.

Umsøkjarar við víðariútbúgving og/ella leiðsluroyndum hava fyrimun.

Starvið er fulltíðarstarv og kann setast skjótast tilber ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært avtalu ímillum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 316788.

Skrivlig umsókn við neyðugum prógvum skal sendast til leiðaran á
Lágargarði
Stoffalág 84
Box 1188
110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er til týsdagi 25. sept. 2001.

**Mentamálastýrið**
*Vinnu- og miðnámsskúladeildin*

# Projektkapping um miðnámsskúla í Suðuroy

Mentamálastýrið bjóðar við hesum til kapping um uppskot til nýggjan miðnámsskúla í Suðuroy.

Endamálið við kappingini er at fáa fram uppskot til skúla, ið kann gerast tíðarhóskandi karmur um fjølbroytt og framkomin útbúgvingartilboð fyri ung og tilkomin. Skúlin skal samstundis hava umstøður at gerast virkin partur av samfelagnum og geva møguleikar fyri at binda saman undirvísing, mentan, arbeiðslív og vinnulív í oynni.

Kappingin er almenn projektkapping, útskrivað sambært kappingarreglunum hjá Arkitektafelagi Føroya. Talan er um eina opna kapping, har øll, ið halda seg hava førleika at vera við, kunnu lata inn uppskot.

Til virðislønir og møgulig keyp av uppskotum hevur dómsnevndin kr. 200.000 at ráða yvir. Av hesi upphædd skal tó ein 1. virðisløn verða latin, til støddar ikki minni enn kr. 100.000.

Tilfar og treytir fyri kappingini fáast við at venda sær skrivliga til

**Arkitektafelag Føroya**
postboks 1293
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 4. september 2001

**Mentamálastýrið**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2828, P/F Petur & Petur, 100 Tórshavn.

Viðtikið 06.06.2001 at lække partapeningin við kr. 240.000,00 til kurs 500 við útgjalding til partaeigarar, eftir at proklama er runnin.

Skráseting Føroya tann 4. september 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2695, P/F Atlantic Petroleum, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 22.06.2001.

Skráseting Føroya tann 4. september 2001

Kristin Balle

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Blóðgevar

Blóðbankanum tørvar fleiri blóðgevar.

Øll millum 18 og 60 ár, eru ógvuliga vælkomin at melda seg til mánadagin 10/9 og týsdagin 11/9 millum kl. 16.00 og 18.00 í blóðbankanum.

Annars hvønn mánadag til fríggjadag frá kl. 8.00 til 15.00.

**Vinarliga Landssjúkrahúsið**

# Brúktar byrsur



**Nógvar góðar brúktar byrsur á goymslu**

**P/f Jógvan Weihe**
Heil & smásøla
Staravegur 15
Box 1008 Tórshavn
Tlf. 313897